E A E Fiss H7

1. Forðum søkti eg á Harri, eina signingar frá tær.
   E A E A H E
   Søkti eina tínar gávur, nú tú sjálvur alt ert mær.

   Niðurlag:
   E Fiss H7
   Jesus, Jesus, Jesus eina, tú ert vorðin alt hjá mær,
   E A E A H E
   Alt á jørð og alt í himli, alt eg havi nú í tær.

2. Fyrr á kenslur bert eg bygdi, nú á orð títt byggi eg.
   Og hin himmal íð eg søkti, fann eg við at kenna teg.

3. Eitt sinn frið í tí eg søkti, sum eg gjørdi fyri teg,
   Nú er tað mín friður vorðin, sum tú gjørdi fyri meg.

4. Áður helt eg mær við Jesus, nú nú heldur Jesus mær.
   Ei við streyminum eg reki, Hann meg varðar trygt hjá sær.

5. Leingi bar eg tungar byrðar, nú ber Hann tær fyri meg.
   Hvat eg eri, var og verði, Jesus tók tað alt á seg.

Umsett úr donskum.